**KANINHÚS**
Kaninhús fæst við at heinta tað.
*Tlf. 318700/228700*

**KETTLINGUR FUNNIN**
ıttanfyri Miðlon týsdagin 20.02. Hann er helvtin hvítur og helvtin brúnligur. Eigarin biðist venda sær til
*Djóraverndarfelagið tlf. 504533*

**ÍSLENDSKT ROSS YNSKIST**
Eg eri ein 13 ára gomul genta, sum leiti eftir einum íslendskum rossi (helst ryssu), hon skal vera barnavinarlig.
*Tlf. 333046/250646*

**STÓRT FUGLABÚÐUR**
við 2 hæddum + undulátar, bíliga til sølu. Bert til djóravin.
*Tlf. 503157*

## Fundir

**AÐALFUNDUR**
hjá Vága Sambandsfelag verður týsdagin 6. mars kl. 19.30. Nærri verður lýst seinni.
*Nevndin*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Hugnakvøldið verður á Mørkini í Streymnesi mánakvøldið 5. mars kl. 19.
*Nevndin*

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
hevur fund í Losjuni, Tinghúsvegi 18, mikukvøldið 28. februar kl. 19. Vit hava pakkauppboðssølu. Limirnir kunnu taka pakkarnar við á fundin.
*Nevndin*

**FRÁ SINNISBATA**
Ársaðalfundurin verður í Miðlahúsinum leygardagin 17. mars kl. 15. Skrá samb. viðtøkum felagsins.
*Nevndin*

**AÐALFUNDUR**
Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag heldur ársaðalfund í Bjargingarfelagshúsinum í Kollafirði fríggjad. tann 9. mars kl. 19.30.
*Nevndin*

## Húsarhaldstól

**GRAM FRYSTISKÁP**
h. 85 - b. 57 - d. 60 til sølu fyri 1.800,- kr.
*Tlf. 316451*

**ELDRI TURKITRUMLA**
til sølu fyri 300,- Virkar væl.
*Tlf. 210311*

## Innbúgv

**HVÍT KOMMODA**
Hvít kommoda og ovalt spegl til sølu. Prísuppskot 800 kr. Sí www.djurholm.blogspot.com
*Tlf. 316099 ella 230833*

**SOVISOFA**
Ein einkult sovisofa til sølu.
*Tlf. 312487*

**GAMLIR ANTIK-MØBLAR TIL SØLU**
t.d. hillar, krakkar, smáborð, dukkuvognur, bonkur o.a.
*Tlf. 310245/510245 e. kl. 15*

**SOFUR TIL SØLU**
Tvær nougatfarvaðar sofur 3+2 til sølu fyri 5000,- kr. Sjónvarpsskáp/borð fyri 150,- kr
*319030*

**SPISEBORD MED STOLE**
Malta spisebord med mat glas og aluminium sælges med 6 tilhørende Gizmo stole. Er meget stilrent. Bordet kan trækkes ud med ekstra plade.
*555050*

**RUNDT TRÆBORD**
Flot mørkt antikt træbord sælges billigt. Giv et bud!
*555050*

**SPÍSISTOVUBORÐ**
brúnt v/kaklum v/1 floyu og 6 stólum kr. 800,00.
*Tlf. 280039/210039*

**LEÐURSOFA**
Svørt leðursofa fæst ókeypis við at heinta hana.
*Tlf. 317540/320150*

**IKEA HEMNES DAGSONG**
v/ madrass, super lekrar sengur, óútpakkaðar til sølu vegna feilkeyp. Songin hevur fýra funktiónir: Sofa, einkultsong, dupultsong og uppbevaringspláss. Hvíttlakerað. b. 87 x l. 211 h. 85 cm. Ótrúliga lekkur song.
*Tlf. 226706, Ranvá*

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur ein Traip-trap stól í góðum standi, bíliga til sølu, eri eg sera áhugað.
*Tlf. 422988/591988*

**KLÆÐNASKÁP**
Tvey óbrúkt klædnaskáp til sølu vegna plásstrot.
*Tlf. 313975*

**YMIST TIL SØLU**
Hvítur rúm deilari við 8 rúmum 400 kr. Kommoda 5 skuffur, lak. bók 150 kr. Høg reol úr furu 250 kr.
*Tlf. 211001*

**YMIST INNBÚGV TIL SØLU**
Alt er av herdaðum roykfarvaðum glasi.
Sofaborð 80x120 cm. 500 kr.
Sjónvarpsborð við hill undir 350 kr.
Stereoreol við 4 hillum 400 kr.
Blómuborð 150 kr. CD-Reol at hanga upp við nógvum hillum 500 kr.
*Tlf. 211001*

**SPÍSIBORÐ V/ 6 STÓLUM**
Borðið er av roykfarvaðum herdaðum glasi og alufarvaðum beinum, kann leingjast til 12 pláss. Stólarnir eru úr svørtum leðri og alufarvaði bein, í sera góðum standi, til sølu fyri 2.500,- Nýprísur 9.000,-
*Tlf. 211011*

**2 LENISTÓLAR V/ SKAMLI OG BORÐI**
úr svørtum leðri við alufarvaðum beinum. Rygglen kann leggjast niður. Borðið er av herdaðum roykfarvaðum glasi og alufarv. beinum. Sera vakurt. Til sølu fyri 3.000,- Nýprísur 8.000,-
*Tlf. 211001*

**BRÚKTAR**
harmonikuhurðar ynskjast, 2 stk., hurðamát 205x82.
*Tlf. 317024*

## Lutaseðlar

**LUTASEÐLAR Á TUNNUSLÁTTRINUM**
hjá KÍF: Hesir vinningar eru ikki avheintaðir:
3: Rækjur hvítur nr. L 96327.
7: Gávukort bláur nr. 96.
9: Gávukort hvítur nr. L. 96003.
*Tlf. 226454*

## Pløgg

**SKJÚRT**
Føroyskt skjúrt, blátt, str. 38-40 til sølu fyri 2.800,- kr.
*Tlf. 317835*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI TIL SØLU**
Lilly, str. 36 við eyka longd og prýði. Tunnur jakki str. 40 og sandalir str. 40 til sølu, saman ella hvør sær.
*Tlf. 521576/321576*

**VAKUR 2-DEILDUR**
konfirmatiónskjóli, std. 38, skógvar std. 40, hvítt sjal, selist samlað fyri 1400,- kr.
*Tlf. 220504/322850*

**FÓTBÓLTSSKÓGVAR**
Lekrir Nike fótbóltsskógvar std. 36, bláir, til sølu fyri einans 100 kr. Bert brúktir fáar ferðir.
*Ringið 226773*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
Almenn sjavskapping verður í Posthúskjallaranum í miðbýnum í Tórsgøtu týsdagin tann 27. februar kl. 19.

**SJAVSKAPPING**
verður sunnudagin kl. 16.
*NSÍ*

## Súkklur

**FLOTT NÝGGJ**
damusúkkla til sølu við munandi avsláttri.
*Tlf. 312487*

**EIN KREIDLER SKUTARI**
til sølu, vælhildin og hevur einans koyrt 3250 km. Er í góðum standi. Til sølu fyri einans 5.500,-
*TIL SØLU*

**YAMAHA YZF.R1**
árg. 2006, koyrt 4.500 km, til sølu fyri 120.000 kr.
*Tlf. 266068 eftir arbeiðstíð*

## Teldur

**DVD-SPÆLARI TIL SØLU**
eksternur, til teldu til sølu fyri 100 kr. Bert brúktur eina fer. Til sølu fyri 100 kr.
Sí www.djurholm.blogspot.com
*Tlf. 316099/230833*

**PLAYSTATION 2**
Buzz music quiz til sølu fyri 200 kr. Einki brúkt, sum nýggj.
*Tlf. 271723*

## Tónleikur

**SAXOFON-TASKA**
Fligt-case-taska til sølu fyri 400 kr. Við hesi tasku er lætt at bera saxofonina á rygginum. Góður standur.
Sí www.djurholm.blogspot.com
*Tlf. 316099/230833*

**TIL SØLU**
El-klaver, Technics, SX-PX224, lítið brúkt og sum nýtt. Kom gev eitt boð, tó min. 6.000 kr. Sí www.djurholm.blogspot.com
*Tlf. 316099/230833*

**EIN CARL MARTIN**
hot-drive'n boost MK3 guitar pedal til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 270427*

**EIN GEORG DENNIS**
guitar volume pedal til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 270427*

**GUITAR OG POSE**
Flot og klangfuld western guitar sælges med pose. 2500,-
*555050*

## Ymiskt

**RENNIBAND**
Renniband ynskist til keyps.
*Tlf. 319265/243431*

**VINDEYGU TIL SØLU**
9 vindeygu, stødd 73,8x118,8. Hvítt lakerað, til sølu vegna feilkeyp. Nýggj.
*Tlf. 230071*

**SEPTIKTANGI**
Ein grønur septiktangi (Kaldbakstangi) til sølu fyri 5000 kr.
*Tlf. 270427*

**FLAGGSTONG**
Ein 10 m. long flaggstong til sølu fyri 4000 kr.
*Tlf. 270427*

**250 TFL. KORT**
mest talutíðarkort til sølu fyri 2 kr. stk.
*Tlf. 270427*

**TIL SALG**
Jagtgevær Baikal kal 12 S/S i god stand. ca 1800 kr. Efter kl 17.00
*448679*

**FERÐAST Í SUÐUROY!**
Stór, góð hús við øllum vanligum innbúgvi til leigu í longri ella stytri tíð.
*Tlf. 573054 /373054*

**GRÁTT BAÐIKAR**
150 cm. langt, sera bíliga til sølu.
*Tlf. 210311*

**KOYRIKORT TIL LASTBIL**
Um nóg nógv tekna seg, byrjar nýtt skeið til lastbil í Eysturoynni. Møguliga seinsta skeiðið til ta gomlu skipanina.

Tekning á
*Akskúli Føroya tlf. 777777*

**HOYGGJ TIL SØLU**
Hoyggj til sølu.
*Tlf. 313386*

**RUSKSTATIV**
2 net ruskstativ fáast við at avheinta tey.
*Tlf. 310208/260535*

**KASSAAPPARAT**
Kassaapparat við minst 4 vørubólkum ynskist til keyps.
*Ring 373960 Suðuroyar Heimavirki*

**VIGAR TÚ OV NÓGV ??**
Ynskir tú at lætna og verða verandi kløn/klænur? Eingin hungur, tú ert altíð mett/ur. Fá meiri orku og størri vælveru. Ring ella send ein teldupost til Jónu Mortensen, Herbalife forhandlara, Tlf. 316312 far: 582527Teldupostadr: jonamortensen@yahoo.dk
*Tlf. 316312/582727*

# Seta nú punktum fyri ógloymandi løtum



*Silly Boys sleppa at sløkkja ljósið fyri einum 20 ára gomlum minni í ítróttarhøllini í Havn, saman við Thunderbirds*

**Nú verður seinastu ferð, at vit fara aftur í 60 árini í ítróttarhøllini á Hálsi**

AFTURHVARV
Áki Bertholdsen
*aki@sosialurin.fo*

Hondbóltsfelagið Neistin setir nú punktum fyri nógvum ógloymandi løtum.

Heilar 19 ferðir hevur felagið skipað fyri stórum dansitiltaki, sum tey hava kallað aftur í sekstiárini.

Men nú er avgjørt, at tiltakið í ár verður tað allarseinasta av hesum slagnum.

So tá ið Neistin kallar fólk aftur í sekstiárini tann 21. apríl, verður tað avgjørt fyri seinastu ferð.

Tað vera legendarisku bólkarnir, Thunderbirds og Silly Boys, sum sleppa at sløkkja ljósið fyri hesum vældámda tiltakinum, sigur Neistin.

Hesar 19 ferðirnar, tey hava skipað fyri tiltakinum higartil, hava ikki færri enn 36.000 droymt og svingað seg aftur í sekstiárunum, saman við okkara kendastu orkestrum.

Neistin sigur, at orsøkin til, at tey gevast nú, er vit vera jú ikki yngri. Nógv eru ikki millum okkara longur, hvørki tónleikarar ella dansarar og tey, sum vóru í fimtiárunum, tá ið tiltakið byrjaði í 1988, eru í sjeytiárunum nú.

Neistin sigur, at tiltakið hevur verið so væleydnað og hevur havt so stóran týdning fyri fólk úr øllum landinum, at tað er ikki bara inntøkan, sum hevur fingið tey at skipa fyri tiltakinum ár um ár.

Bólkar, sum hava spælt hesa tíðina, eru Faroe Boys, Cream Crackers, Goggan, Silly Boys, Islanders, X-Rays, Rúnar, Thunderbirds, Flamingo, Enjoyers og Tey av Kamarinum.

Annars var ætlanin bara at talan skuldi vera um tað eina tiltakið í 1988. Endamálið var at skipa fyri einum øðrvísi kvøldi, har tey gjørdu skrá, settu borð upp og góvu fólki høvi at hugna sær, í meðan tey lurtaðu eftir tónleiki frá sekstiárunum. Men tiltakið varð so vælumtókt, at hetta varð eitt afturvendandi tiltak.